# Rógvi í La Manga

Norska felagið Hødd fór um vikuskiftið til Spania at leggja seinastu hond á fyrireikingarnar til kappingina. Í La Manga vóru 25 hitastig, tá ið spælararnir komu sunnudagin, og tað verður í góðveðrinum, at Hødd skal venja og spæla venjingardystir næstu vikuna. Ætlanin er at venja tvær ferðir um dagin, og dystir verða eiini ímóti Nybergsund og LøvHam, sum eisini hava leitað sær suður eftir at venja undan norsku kappingini.



# Vil hava langar bóltar

Vøllirnir í Danmark eru ikki av teimum bestu, nú landskappingarnar byrja aftur, og tað hevur eisini avleiðingar á spælið hjá feløgunum. Fleiri av liðunum hava givið upp at spæla polerað fótbóltsspæl hesa ársins tíð og senda heldur langar bóltar fram á vøllin. Tað var eisini uppskriftin hjá OB, sum vann ímóti AGF sunnudagin. - Tá ið tú koyrir bil, koyrir tú eftir umstøðunum, og soleiðis er eisini við fótbólti. Í dag spældu vit ov fáar langar bóltar fram á vøllin, segði OB-venjarin Lars Olsen eftir dystin.



*Áki Mørk hevur sitið nógv uttanfyri, men var á vøllinum til finalurnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Áki kom, sá og sigraði

**Størsta partin av árinum hevur Áki Mørk sitið skaddur á Neista-beinkinum. Men tá mest stóð á, var hann maður fyri at taka ábyrgd í avgerandi løtunum**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fram um flestu av hinum spælarunum á vøllinum, so var Áki Mørk stóri profilurin, tá seinna FM-finalan millum StÍF og Neistan stóð á skránni.

Eftir bert tveir dystir av kappingarárinum var annars líkt til, at hetta var av fyri hansara viðkomandi. Ein argandi menisk-skaði fekst ikki í rættlag, og tey flestu høvdu helst avskrivað spælaran.

Í fýra av seinastu fimm dystunum hevur hann tó verið aftur á liðnum, men hann vildi ikki leggja tað heilt nógva í, at hansara týdningur var so stórur í finaluni.

- Tað at hava verið skaddur í fýra mánaðir, men so kortini sleppa at spæla finalu. Tað er fantastiskt. Hvussu nógv mál eg so skoraði, hevur minni at siga. Bara liðið vinnur, og tað gjørdu vit.

- Marian gjørdi tað annars til ein sera truplan dyst hjá okkum. Men vit standa eisini væl í verjupartinum, og vit eru ongan tíð meira enn tvey mál aftanfyri. Vit hanga í teimum alla tíðina, og so eru vit kaldari í avgerandi løtunum.

### Høvdu ráð til niðurtúrin

Leingi sá annars út til, at Neistin als ikki skuldi verða partur av finaluni. Hóast góðu byrjanina upp á kappingarárið, so hótti Kyndil meira og meira, sum vikurnar gingu í 2008. Men tað sær kortini ikki út til at vera nakað, sum hevur nervað bláa liðið serliga nógv.

- Eg vil heldur siga tað so, at vit høvdu ráð til ein lítlan niðurtúr. Góða byrjanin gav okkum eina greiða leiðslu, og tí vóru vit betri fyri í endaspurtinum. Og sjálvir hava vit alla tíðina trúð upp á okkara møguleika. Tað liðið, sum vit hava, er somikið gott, at vit eiga at trúgva upp á tað.

Og tá tit so veruliga komu ígongd, hildu tit kanska, at sigurin í finaluni var heilt nær?

- Ja. Ein og hvør sigur ber meira sjálvsálit til liðið. Og tí vistu vit, at vit kundu gera tað. Og tíbetur eydnaðist tað okkum eisini, sigur Áki Mørk.



*Drúgvu royndirnar hjá Inga Olsen komu væl við hjá Neistanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Jacob Larsen bjargaði Neistanum

**Neistin var fullkomiliga í upployson í seinna hálvleiki, men stórbjargingar frá Jacob Larsen høvdu við sær, at havnarfelagið tók fyrsta fetið í FM-stríðnum**

HONDBÓLTUR

*Uni Holm Johannesen*

Neistin tók skírishósdag fyrsta fetið móti FM-heitinum, tá teir koppaðu StÍF í fyrstu finaluni, sum var í høllini á Hálsi. Havnarfelagið vann 24-23, eftir hálvleiksstøðuna 18-13.

Teir bláu úr høvuðstaðnum vóru væl omaná í fyrra hálvleiki, og so líðandi øktist munurin millum liðini. Tá farið varð til hálvleiks, var Neistin á odda við fimm málum, og lunnar vóru av álvara lagdur undir ein tryggan sigur.

Í seinna hálvleiki fór Neistin fullkomiliga í upploysn, meðan StÍF av álvara reistist aftur. Heimaliðið skoraði bara eina ferð fyrstu 14 minuttirnar eftir hvíldina, og tá Danni Syhler átta minuttir fyri tíð skoraði eftir snarálop vóru gestirnir brádliga á odda við einum máli – 21-22.

Men stórbjargingar frá danska málverjanum, Jacob Larsen, høvdi við sær, at Neistin ressaðist við aftur. Í síðstu sekundunum vardi hann fyri roynd frá David Edvardsen, sum slapp leysur, og so var frøin stór á heimafjepparunum. Neistin vann við 24-23, og høvdu eitt frálíkt útgangsstøðið áðrenn seinnu finaluna á Skála leygardagin.

# Ikki klárir til finalurnar

**Tvey silvurmerki gjørdist úrtøkan hjá StÍF, sum annars í stórum pørtum av árinum hevur sæð út sum besta manslíðið í landinum**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Saman við spælarum sínum mátti Claus Rasmussen standa sum áskoðari til fagnaðin hinumegin miðlinjuna, har Neistin og fjepparar teirra fagnaðust um FM-gullið.

Men hóast vónbrotið, so var Claus Rasmussen skjótur at ásanna, at árið í ár ikki skuldi verða teirra ár.

- Vit mugu bara ásanna, at vit ikki raktu dagin. Og tað kundi verið líkt til, at liðið ikki er nóg væl fyri til slíkar dystir. So mentalt hava vit nakað at arbeiða við til næsta ár, segði Claus Rasmussen í løtuni eftir dystin.

- Men eg eri keddur um, at vit bara skora 21 mál í dag. Tað er for lítið og er snøgt sagt ikki nóg gott.

Men spælið var kanska heldur ikki so gott í dag, sum tað kann verða frá hesum báðum liðunum?

- Tað koyrir for tungt. Vit ivast á vøllinum, og vit gera ikki arbeiðið liðugt, soleiðis sum vit ætlaðu. Og tað er eitt sindur keðiligt.

### Ov nógvir lættir dystir

Ein vansi hjá StÍF hevur helst verið, at liðið í nógvar vikur var púrasta víst í finalusessinum. Spurningurin var bara, um tað var Neistin ella Kyndil, sum skuldi verða mótstøðuliðið, og tað heldur Claus Rasmussen eisini hevur ávirkað hansara menn.

- Tað hevur tað heilt víst. Onkran dyst nú móti endanum vunnu vit eini 43-19, og tí hava vit ikki verið uppi í nóg stórum tempo seinastu tíðina. Og so er tað trupult at umstilla teg til knappliga at spæla móti einum liði, sum vil spæla hondbólt og sum vil vinna. Og tað megnaðu vit ikki.

Tað slepst ikki undan, at Claus eisini eigur sín lítla lut í gullinum hjá Neistanum. Bæði í fjør og í fyrraárið var hann venjari hjá einum ungum Neista-liði, og ætlanin var alla tíðina, at tað arbeiðið skuldi geva úrslit í ár.

Men sjálvur vildi Claus tó ikki taka nakað av heiðrinum frá Inga Olsen, sum er venjari hjá Neistanum.

- Neistin hevur gjørt tað gott. Teir hava arbeitt ótrúliga hart saman við Inga, og tað er hetta arbeiðið, sum hevur borið teir á mál. Men tað er sjálvandi stuttligt hjá mær at síggja, at fleiri av spælarunum, sum eg vandi í tvey ár, nú eru við hjá meistarunum, sigur Claus Rasmussen.

felagnum fyri árum síðani, so fekk hann einki gullheiðursmerki fyri sítt avrik hendan dagin. Ingi Olsen hevur leitt liðið seinasta fetið, og høvuðsstaðarfelagið kann nú lata seg fagna. Teir hava runnið aftaná StÍF seinastu mánaðirnar, men tá tað stóð á var vunnu teir uppiborið. Viðhaldsfólkini runnu alt fyri eitt inn á vøllin at heiðra sínum hetjum, og rómurin var øgiligur, tá Karl Odmar Rasmussen tók ímóti steypinum.

Neistin er aftur á ovastu rók í føroyskum manshondbólti, og vit á Sosialinum ynskja teimum tillukku.